# Hetlendingar ynskja olju-samvinnu við føroyingar

**Í Hetlandi verður fylgt væl við, hvussu føroyingar fyrireika seg til eina komandi oljuvinnu, og tað er eingin loyna, at hetlendingar fegnir síggja, at føroysk olja verður flutt til risastóra oljuterminalin í Sullom Voe heldur enn at verða flutt til lands í Føroyum**

OLJUSAMVINNA
*Jan Müller*



*Jeff Goddard frá Shetland Island Council sær stórar møguleikar í oljusamvinnu millum Føroyar og Hetland*
*Mynd Jan Müller*

Nú um dagarnar vitjaði ein av teimum embætismonnunum í Shetland Island Council, sum umsitur grunnar við oljupengum. Endamálið við vitjanini var m.a. at kunna seg við føroysk viðurskifti og at fáa innlit í, hvussu langt føroyingar eru komnir á oljuøkinum og hvørjar framtíðar ætlanir eru her.

Jeff Goddard er úr Kent í Bretlandi og hevur búð í Hetlandi seinastu seks árini. Hann arbeiðir fyri Shetland Island Council, sum umsitur eina ørgrynnu av grunnum við oljupengum. Sosialurin skilur, at tað í umrøddu grunnum í dag eru nógvar milliardir krónur. Hagtøl vísa, at talan er um einar 5 milliardir men helst er rætta talið nærri teimum 10 milliardunum. Talan er so um bæði váðafúsar grunnar, ið stuðla ymsum vinnulívsverkætlanum, og síðani grunnar, sum lata pengar til sosial- og ymisk vælferðarendamál. Grunnarnir hava eingi starvsfólk sum so, men tað er fyrisitingin í Shetland Islands Council, sum umsitur teir ymsu grunnarnar.

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Jeff Goddard er at umsita ein av grunnunum, nevndur »Charitable Trust«. Pengarnir í teimum ymsu grunnunum stava allir frá oljuinntøkum.

Herfyri skrivaðu vit, hvønn týdning hetlendingar meta ein nýggj Norrøna kann hava fyri Hetland. Jeff Goddard segði við blaðið, at hetlendingar vilja fegnir knýta tættari bond við Føroyar, ikki minst nú ein komandi oljuvinna stendur fyri framman. Sjálvir hava teir livað við oljuni nú í 25 ár og halda seg tí hava góð ráð at geva føroyingum. Men hetlendingar hugsa sjálvandi eisini um, hvat teir kunnu fáa burtur úr eini komandi føroyskari oljuvinnu.

Verður olja funnin við Føroyar, er tað eingin loyna, at hetlendingar fegnir síggja, at oljan verður flutt til oljuterminalin í Sullom Voe heldur enn í land í Føroyum. Tað er umleið sami teinur til Hetlands sum til Føroya frá møguligum føroyskum oljufeltum og við at flyta oljuna beinleiðis til Hetlands sleppa føroyingar undan at skula brúka stórt uppland til eina oljuhavn og at gera tær neyðugu íløgurnar saman við oljufeløgunum. Haraftrat slepst undan vandanum fyri møguligari dálking, um tangaskip skulu flyta olju til lands í Føroyum.

Spurningurin er eisini, hvussu nógv slætt uppland er til at byggja ein stóran oljuterminal í Føroyum. Eisini vil eitt slíkt arbeiði hava við sær, at nógvir útlendingar mugu flyta til Føroya at gera arbeiðið, so hetlendingar halda tað hevði verið skilagott fyri kanska bæði føroyingar og hetlendingar, um øll oljan frá Atlantsmótinum endaði í goymslutangunum í Sullom Voe. Tá sluppu føroyingar heilt undan teimum trupulleikum, sum ein føroyskur oljuterminalur vildi havt við sær. Í dag verður bert helvtin av goymsluorkuni har brúkt.

Hetlendingar síggja annars fram til, at BP og onnur oljufeløg fara at seta á Clairfeltið, sum liggur stutt frá Hetlandi og at lagdir verða rørleiðingar til Sullom Voe. Tá vil hetta tryggja arbeiði í Sullom Voe í hvussu er 20 ár aftrat. Fyri so ikki at tosa um, verða tað funnin størri oljufelt aftrat á Atlantsmótinum, tvs. eisini á føroyskum øki. Tað er greitt, at hjartað í hetlendsku oljuvinnuni er stóri oljuterminalurin Sullom Voe. Hann er størsti av sínum slag í Europa og stendur júst nú fyri eini útbygging. Herfyri ljóðaði annars, at oljufeløgini høvdu minni og minni áhuga í at brúka terminalin, men síðani BP og onnur stór oljufeløg eru farin at vísa bæði Norðsjónum og Atlantsmótinum størri ans, er Sullom Voe aftur komið til sín rætt.

## Drúgvar royndir

– Hetlendingar hava livað við oljuvinnuni í 25 ár. Hon hevur ávirkað samfelagið nógv. Hetlendingar halda seg kenna oljuvinnuna og hava harvið kanska nakað av geva føroyingum, tá tað kemur til ráðgeving og innlit í hesa vinnu sigur Jeff Goddard, sum undir vitjan síni í Føroyum eisini hitti umboð fyri føroyskt oljufelag.

– Tað er ringt hjá mær at tosa vegna hetlendingar, hvussu oljuvinnan hevur broytt samfelagið til tað betra og verra, nú eg bert havi búð í Hetlandi í nøkur ár. Tað verður tó ringt at finna nakran her, sum ikki vil góðtaka, at Hetland er nógv betur fyri búskaparliga við oljuvinnuni. Ikki bert kemur væl av peningi til Shetland Islands Council. Tað eru eisini mong væl lønt arbeiði í hesi vinnu, sum hetlendingar sita á. Nógvir hetlendingar hava skiftiarbeiði eitt nú í sambandi við nógva virksemið í havnini í Sullom Voe. Tað kemur væl við at arbeiða á henda hátt, tí tá kunnu teir eisini taka sær av seyði o.ø. sum eisini hevur stóran týdning.

Jeff Goddard sigur víðari, at tað uttan iva vil vera onkur, sum heldur, at oljan hevur einki gott gjørt fyri Hetland, men tað kemst ikki uttan um, at hon hevur skapt størri vælferð. Fólk vilja hava sín egna bil, hita í húsinum ol.

Jeff Goddard heldur ikki, at oljuvinnan hevur hava ringa ávirkan á mentan og samfelag sum so. Hetland hevur altíð havt nógv vitjandi og harvið verið eitt rættiliga blandað samfelag. Nógv fólk uttanífrá eru flutt til Hetlands, tá nógv arbeiði hevur verið, so mentanin verið rættiliga fjøltáttað. Nógv er annars broytt seinastu 15 árini til tað betra. Tað er líkasum at upprunamentanin og málið hava verða raðfest hægri. Hetta sæst m.a. aftur í bókmentunum og dansinum.

## Týdning fyri fiskivinnu

Jeff Goddard heldur annars, at oljupengarnir eru komnir væl við í fiskivinnuni. Fiskivinnan hevur sjálvandi verið bæði upp- og niðurgangandi. Meðan flestu kvotur í Bretlandi eru seldar av landinum, so hevur tað eydnast hetlendingum við oljupengum at keypa kvoturnar, soleiðis at tær í dag hoyra til lokalsamfelagið heldur enn til einstakar hetlendingar, og harvið er ikki vandi fyri, at tær verða seldar til útlendingar eins og galdandi er í Onglandi. So ein kann siga, at her kemur oljupeningur væl við hjá fiskivinnuni í Hetlandi.

Annars er størsta inntøkan frá oljuni oljuskatturin, sum eru risastórar inntøkur, ið enda hjá skattamyndugleikunum í London. Hetland fær sum so bert ein lítlan part av hesum inntøkum, einar 10 mill. pund um árið. So er eisini ein lokalur oljuskattur, sum ikki gevur so nógv. Men oljufeløgini gjalda Shetland Islands Council eina ávísa upphædd á hvørjum ári. Aðrar inntøkur, sum Hetland fær frá oljuni, er so leiga fyri terminalin, tað er eisini umsiting av sjálvari havnini í Sullom Voe og raksturin av 5 sleipibátum, ið Shetland Island Council eigur. Nógvar av umrøddu oljuinntøkum enda í teimum grunnum, sum Shetland Island Council umsitur.




*Ætlanin er at leggja eina gasleiðing úr Foinaven og Schiehallion oljufeltunum beint við markið til Sullom Voe. Henda leiðing kann koma at fáa týdning fyri føroysk olju- og gassfelt við markið í framtíðini*



*SullomVoe er størsti oljuterminalurin í Europa. Hann kann taka 1,2 mill. tunnur av olju um dagin, men í løtuni tekur hann um 600.000 tunnur. Útlit eru kortini út til at oljuhavnin fer at verða nógv meira brúkt*



## TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni* · *Heri Joensen, prestur* · *Heri Kragesteen, sálarfrøðingur* · *Ingi Højgaard, løgfrøðingur* · *Jens Andreassen, lækni* · *Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur* · *Jón Klein Olsen, politistur* · *Jón Kragesteen. Ferðslutrygd* · *Julianna Næs, pedagogur* · *Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi* · *Turid Thomsen, lestrarvegleiðari* · *Marius Staksberg, málfrøðingur*

DJÓRALÆKNIN

### Ov nógv kraftfóður óhepnar fylgjur

Hjá øllum, sum hava seyð, er spurningurin um heimaseyð eitt afturvendandi kjakevni. Nógv vilja hava seyðin heima um veturin, sjálvsagt tí at tey meina at gera væl við seyðin. Hinvegin eru tey mong, sum halda, at hetta er at gera seyðinum eina bjarnartænastu. Tey vísa á, at seyður er skaptur til at klára seg úti um veturin, og stúrt verður fyri, at við at hava seyðin heima um veturin, verður hann meiri og meiri forvandur og erkvisin. Sum ein bóndi norðanfyri seyði í Sosialinum herfyri »Heimaseyðurin er so forvandur, at hann tímir ikki so frægt sum at skava í kavanum«. Avleiðingin av tí er, at hann klárar seg verri og verri úti og at hann tí at enda als ikki klárar seg í haganum, men noyðist at vera heima. Hevur djóralæknin nakra meining um hetta?

Ullin á føroyskum seyði er tiltikin góð. Summi halda, at eginleikarnir í ullini broytast – til tað verra skilst – av at seyðurin er so nógv heima? Hevur djóralæknin nakrar royndir av tí? Tað eru eisini tey, sum halda uppá, at teir trupulleikar, sum eru av seyði, eitt nú í lembing, teir eru bara av heimaseyðinum ímeðan hagaseyðurin klárar seg nógv betur? Er hetta so?

*Tann føroyski seyðurin hevur, síðani hann kom til hetta landið, lagað seg til umstøðurnar, sum her eru. Hetta hevur ført við sær, at seyðurin bjargar sær væl í haganum, eisini um veturin. Mark er tó fyri, hvussu lítið seyður kann klára seg við. Hann má hava nakað at bíta, og veðrið hevur sjálvandi eisini ávirkan á, um seyðurin hórar undan. Vit síggja, serliga frá eldri tíðum, tá allur seyðurin gekk úti alt árið, at fellisár vóru. Sovorðnar vetrar er lítið at ivast í, at seyðurin hevur nógv betur av at standa inni, ella at hann hevur møguleikan at ganga út og inn og at givið verður hoyggj, so hann ikki missir jótrið.*

*Hinvegin eigur at vera ansað eftir, at ikki verður gjørt ov gott við seyðin. Royndirnar eru, at um seyðurin fær ov nógv av kraftfóðri, kann hetta hava óhepnar fylgjur við sær. Vandin fyri, at ærnar verða raktar av ávísum sjúkum, er størri. Nevnast kunnu mjólkarfepur og júgurbruni. Men verður farið fram við skili og seyðurin fær, fyrst og fremst gott hoyggj og nakað av kraftfóðri aftrat, so er ivaleyst, at fyrimunir eru við at hava seyðin inni um veturin.*

*Dygdin á ullini kann broytast, tá seyðurin stendur inni. Hinvegin eru hetta ikki broytingar, sum standa við, ella sum arvast til lombini undan óm, sum standa inni. Vandin fyri, at trupulleikar kunnu stinga seg upp í samband við lembing, er størri hjá óm, sum eru heima og sum eru í ov góðum holdum, enn hjá hagaseyði.*

LØGREGLAN

### Skavið kavan av

Nú kavi liggur, síggjast nógvir bilar í ferðsluni, í øllum førum í Havn, koyra á vegnum, uttan at kavin er skavaður av bilinum. Á onkrum bili eg havi sæð er bert eitt lítið hol á forrútinum, soleiðis at førarin sær eitt evarska lítið sindur fram, men hvørki aftur ella til síðuna. Hetta er púra ábyrgdarleyst eftir mínum tykki. Hvat kann løgreglan gera við slíkar førarar, ella hvat kunnu vit, sum ferðast í ferðsluni hvønn dag og eru í vanda, tá ið slíkir førarar eru á vegnum, gera?

*Vit geva spyrjaranum fullkomiliga rætt. Tað er ábyrgdarleyst av bilførarum at seta seg við rættið í einum bili og koyra, uttan at hava frítt útsýni til allar síður. Áðrenn farið verður við bili, skal kavi, ísur ella døgg, ið er lagstur á bilrútarnar, burturbeinast.*

*Sambært § 4 stk. 1 í ferðslulógini skal eitthvørt akfar vera soleiðis útgjørt og hildið í tílíkum standi, at tað kann nýtast uttan óneyðugan vanda og ónáðir hjá øðrum.*

*Politiið hevur ákært fleiri bilførarar, sum ikki hava gjørt hetta. Í slíkum føri, har bert eitt lítið »hol« er í kavanum á forrútinum, kann politiið leggja spurningin fyri rættin um frádøming av koyrikortinum.*

*Tað, sum spyrjarin og ein og hvør kann gera í slíkum føri, sum hava rætta ferðsluhugburðin, er evt. at tosa við fólk og fáa tey at skilja, hvussu ábyrgdarleys henda koyring er. Eisini er neyðugt at ansa sær fyri slíkum bilførarum og annars at boða politinum frá.*

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo




Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i

Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI
• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.
Spyr - tað kostar einki!
Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta
Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78